# hjá ommu og abba





*Stuttur vegur er úr húsunum hjá abbanum og ommuni og oman á bátabrúnna, her ein altíð fær onkran fisk*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Við slík styttri skúlaskift er neyðugt at gjalda fyri undirvísingina. Men tann útreiðslan man ikki telja so nógv í mun til tær upplivingarnar, sum tey trý systkini hava havt í Kollafirði**

ingar. Nú tær hava verið burtur, eru tey tí bert trý eftir í flokkinum, sigur Alfrida.

Júst hvussu leingi tey sleppa at ganga í hesum danska bygdarskúlanum aftrat er óvíst. Har tosa tey nevniliga eisini um at leggja smærru skúlarnar saman, tí barnatalið er minkandi.

## Duga at rokna

Í Kollafirði sluppu tey í munandi størri flokkar, men hetta hevur gingið uttan stórvegis trupulleikar.

- Hini børnini hava bara verið góð við okkum, siga tey trý systkini.

Hósdagin í farnu viku var allur skúlin útferð við Leynavatn. Eina viku herfyri høvdu tey eina evnisviku, har tey m.a. sluppu í sjósavnið í Havn og vóru útferð í Nólsoy.

- Vit hava eisini roknað nógv. Og Kári lærarin, hevur sagt við okkum, at vit duga sera væl at rokna, sigur Lærke.



*- Ein dagin fingu vit ein soooo stóran fisk! Tey trý systkini og mamma teirra hava nógv at siga frá hesum hálva triðja mánaðinum í Kollafirði*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

## Lærararnir ikki so strangir

**Munin millum ein lítlan bygdarskúla í Norðurjyllandi og ein miðalstóran kommunalan skúla í Kollafirði, hava tey trý eisini lagt merki til. Men hvør er so størsti munurin? Tað gongur ein tíð, áðrenn svarið kemur frá einum teirra: - Lærararnir eru ikki so strangir! - Og so hava vit eisini ein deiligan svimjihyl her, og haraftrat eina stóra ítróttarhøll við skúlan. Hjá okkum mugu vit ganga heilt til hin endan av býnum fyri at svimja.**

**- Tað er bara so skeg at svimja, siga tey trý.**